

Hóast Hanus A. Samuelsen var› borin til ognarjør› í Húsavík, var hugurin til skúla og bók størri enn hugurin til jør›ina. Hanus gjørdist skúlama›ur burturav, og hevur nú starvast 40 ár vi› Føroya Studentaskúla

Mynd: Edvard Joensen

Mentist í søgu og søgn

Hanus A. Samuelsen var› føddur og vaks upp í mentanarbygdini Húsavík. Í barnaheiminum var væl av ognarjør›. Men hjá Hanusi var bókahugurin størri enn jar›arhugurin, og hann gjørdist skúlama›ur burturav. Hann hevur nú starvast sum lærari í 40 ár

Vi›tal

Fyrri partur
Edvard Joensen

Tilvildin gjørdi, at hann tríggjar fer›ir byrja›i seinni enn hinir floksfelagarnir í skúlanum. Men kortini hevur hann veri› í skúla alt lívi›. Nú skúlaári› byrja›i aftur, vóru 40 ár li›in, sí›an Hanus A. Samuelsen byrja›i sín læraragerning, og hann ætlar at halda fram.

10. september 1936 var aftur barnagrátur at hoyra í Skumpitoft í Húsavík. Langt var sí›an seinast. Men hendan dagin átti Súsanna son, sum hon og ma›urin, Óli, nevndu Hanus Antoniussen Samuelsen.

Í hesum søguliga umhvørvinum í Húsavík vaks hin lítli Hanus upp. Har komu fólk á gátt, sum væl dámdu at práta og siga frá. Søguliga hendingar vór›u tiknar fram. Tosa› var› um fólk, sum undan vóru farin og um tey, sum enn vóru uppi á døgum. Fólk, bæ›i úr bygdini og av bygd, stukku inn á gólvi›, og nógv var› spurt og fregna›, kanska serliga tá avbygdarfólk kom á gátt. Av fólki, sum stakk inn á gólvi› minnist hann Janus undir Leitinum í Húsavík og Hans á Mølini í Skálavík sum gó›ar frásøgumenn.

Hin ungi Hanus hev›i gó›an hug at læra og sat undir tí, havt var› á máli. Honum dámdi væl søgurnar, og serliga stuttligt helt hann ta› vera, tá sagt var frá ymsum fólki, sum hev›i gjørt ta› ella ta›.

Ta› var ikki bara ta›, grei›ir Hanus frá, at tey søgdu frá, hvussu fólkini vóru. Tey spældu hesi fólkini. Hermdu eftir teimum. Solei›is at skilja, at tey tosa›u sum hesi fólkini, sagt var› frá.

»Á tann hátt metti eg meg at kenna hesi fólkini, sum langt sí›an vóru farin hi›ani, men kortini tóktust hava vitja› heima hjá okkum«, minnist Hanus í Skumpitoft.

Gamalt umhvørvi

Ta› er helst eingin heilt nágreiniliga frásøgn um, hva›ani húsanavni› »Skumpitoft« kemur, sigur Hanus.

Gamalt er, grei›ir hann frá, at har vóru gamlar toftir á sta›num, i› mestsum lógu sum órudd. Tær vór›u so skumpa›ar saman og brúktar sum stø›i at byggja n‡ggj hús á. Hesi húsini vór›u eftir hesum samanskumpa›u leivdunum nevnd »Í Skumpitoft.«

Mansnøvnini í húsinum gingu upp á skift. Antinis og Hanus hava teir iti›.

Hanusarnavni› sigst ganga heilt aftur til Hans Tausen, danska trúbótarmannin, føddur í 1494. Oldabbasonur hansara, Hans, var fa›ir at Nicolai Hansen Tausen, i› kom úr Noreg til Føroya fyri gó›um 300 árum sí›an og var bartskeri og s‡sluma›ur. Sonur hansara, Hanus, átti vi› seinnu konu síni í Skálavík Antinis, i› bygdi Skumpitoft fyri gó›um 200 árum sí›an. Abbasonur Hanusar, sum eisini eitur Hanus, er fimtanda ættarli› frá Hans Tausen og tann áttandi Hanus í rø›ini.

Antinis navni› fall burtur ímillum, tá abbi Hanusar, sum eisini æt Hanus, bert fekk eina dóttur, sum nevnd var› Súsanna. Hon giftist Óla á M‡rini, og tey búsettust í Skumpitoft. Tilkomin fingu tey son, sum Óli vildi skuldi bera gamla navni› í húsinum. Sjálvur metti hann seg sum tilfluttan. Drongurin var› nevndur Hanus og fekk gamla ættarnavni› Anthoniussen, sum millumnavn, og komu solei›is bæ›i Hanus og Antines nøvnini at ver›a borin ví›ari.

Fa›ir Hanusar, Óli í Skumpitoft, tjørar húsini í Skumpitoft í 1973

Mynd: Edvard Joensen

Hanus A. Samuelsen grei›ir frá, at abbi hansara, hin fyrr nevndi Hanus, vildi var›veita tey fornminni, sum vóru í Húsavík. Húsavík er søgulig bygd, har kanska mest Hústrúin hevur veri› kend.

Upp gjøgnum tí›ina er so falli› frá, og toftirnar hava sta›i› eftir. Ikki hevur byggitilfar veri› ta›, mest hevur veri› til av í Føroym, so fólk hava brúkt aftur slíkt, sum hevur veri› vi› hondina. Solei›is hevur eisini veri› vi› toftunum í Húsavík.

Hanus vaks upp í søguríka umhvørvinum í Húsavík. Á steinsettu túnunum, hann sum smádrongur hevur runni› um, hava fólk sum Hústrúin og Kálvur Lítli ivaleyst eisini fer›ast. Húsini í Skumpitoft h.m.

Mynd: Edvard Joensen

Abbin, Hanus í Skumpitoft, tann sætti, vísti tó hesum fornminnum ans og vir›ing og gjørdi nógv fyri at var›veita tey. Hesin ansur fór í arv til dóttur hansara, Súsonnu í Skumpitoft, sum mangur fer›ama›ur, i› vitja› hevur Húsavík seinnu helvt av tjúgundu øld, hevur hitt.

Ta› er vist ikki nágreiniliga sta›fest, hvussu gomul bygd Húsavík er, sigur Hanus. Í Føroyingasøgu er Snæúlvur nevndur og í vi›merking sagdur at búgva í Húsavík, so har man ein tann elsta búsetingin í landinum vera.

Skjalfast er, at Gu›run Sjúr›ardóttir, Hústrúin, var har í 1403.

Um hana eru tvær sagnir, sum eru heldur ólíkar. Onnur er, at hon var olmussugenta úr Skúvoy, sum fann gullhorni› hjá Sigmundi og fyri ta› keypti sær ta jør›, sum gjørdi hana til ríkastu kvinnu um hesa lei›ir.

Hin søgnin, sum meira livir í Húsavík, sigur hana vera komna úr Noreg.

Og ta› passar betri vi› tey skjøl, sum siga, at hon var úr Bergen og giftist til Húsavíkar. Rík hevur hon veri› og átti jør› bæ›i í Noreg og Hetlandi, sum skjøl eisini prógva.

Hugurin var til bókina

Í Skumpitoft var ognarhús og væl av jør› var til. So miki›, at tá bar væl til at liva av tí. Væntandi var, sum natúrligt eisini var, at Hanus skuldi taka vi› og bera ví›ari.

Men heilt tí›liga var› greitt, at hugur hansara var til bókina heldur enn til moldina.

Pápin var eisini bókahuga›ur, men hansara umstø›ur á ungum árum gjørdu, at ikki var hugsandi um anna› enn at vinna til lívsins uppihald. Ikki vildi hann for›a soninum í at lesa, og ta› er so komi› túsundtals føroyskum studentaskúlanæmingum til gó›a hesi 40 árini, Hanus hevur undirvíst á Føroya Stundentaskúla.

Løgi› er ta› kortini, minnist Hanus. Tá hann skuldi í skúla sjey ára gamal í september 1943, útsetti hann. Hann bí›a›i til fyrsta november. So ein dag aftrat, men fór tó at enda í skúla nakrar mána›ar aftaná, at skúlagongdin átti at veri› byrja›.

Í Húsavík vóru tveir flokkar. Eldri og yngri flokkur. So eftir sum næmingurin var til, slapp hann upp í eldra flokkin. Ein lærari var at taka sær av bá›um flokkunum.

Hóast hugurin at lesa var gó›ur, var ikki ta› nógva av lesna›i at fáa hendur á. Onkuntí› hendi ta› seg, at skúlin fekk bøkur til láns frá landsbókasavninum, og tær vór›u so lisnar vi› stórum áhuga. Naka› var í húsinum av avgomlum bókum, sum til dømis Heimskringla á donskum. Og ta› var› sjálvandi alt lisi›.

Tá Hanus seinni kom til Havnar at ganga í skúla, og fann útav, at eitt veruligt bókasavn var, har bøkur bara kundu lænast, fór hann rættiliga at lesa.

Um hesa tí›ina fekk hann eisini fyrstu bindini av onkrum uppslagsverki, hann framvegis dagførir árliga, grei›ir Hanus frá.

Ta› var nú ikki heilt vanligt tá í tí›ini, at gingi› var› í skúla longri fram, sigur Hanus. Ta› var ikki ein og hvør, sum fór í skúla. Ta› var meira si›bundi›. Akademikarabørn og so onkur hendingur aftrat, sum hev›i gó›ar peningaligar umstø›ur ella serliga gó›an hug. Og ikki lá ta› solei›is í kortunum heldur, at hann skuldi lesa og gerast skúlama›ur burturav.

So hendi ta›, grei›ir Hanus frá, at Árni Olsen, fyrrverandi yvirlækni, sum er giftur vi› systkinabarni Hanusar, fór at tosa vi› Thomas Nygaard, sum var rektari á Føroya Studentaskúla, um at lata Hanus sleppa á preliminerskúlan. Árni helt, at ta› var skeivt, at hesin evnagó›i drongurin ikki skuldi fáa n‡tt sínar andaligu gávur.

Nygaard var lagaligur og bey› honum at koma á skúlan, hóast skúlaári› var byrja›. Enn einafer› kom Hanus ov seint í skúla. Hann byrja›i ikki fyrr enn eftir jól.

Tri›ja januar fór hann so til Havnar. Og ta›, at koma úr Húsavík til Havnar, var ein rættiliga stór broyting í lívinum, minnist Hanus.

Ta› er ikki lætt, sigur hann, at koma solei›is inn í ein flokk, sum frammanundan er samansjó›a›ur. Tú kemur fremmandur inn í ein flokk, har fólkini longu kenna hvønn annan. Tú skalt inn um ein gar›, sum hinir næmingarnir longu hava la›a›.

Preliminerskúlin var tvey ára skei›, sum kanska serliga var ætla› bygdarbørnum, sum bert høvdu gingi› í barnaskúla, grei›ir Hanus frá. Í 1959 ver›ur hann broyttur til realskúla, sum var tr‡ára skei›.

At lesa var ta› heilt stóru upplivilsi› hjá Hanusi, minnist hann. Hann las alt, sum var at lesa. Og ta›, at hann bert gekk hálvtanna› ár í preliminerskúlanum, var eingin for›ing fyri at sleppa ví›ari til studentaskúlan.

Hanus grei›ir frá, at honum dámdi at kalla øll fak líka væl. Ta› veri seg rokning, matematikk, fysikk, søgu, mál og hvat nú var. Og tá hann skuldi í studentaskúlan, kundi ta› mestsum gera ta› sama, hvørja deild hann fór á. Hann valdi matematisku deild.

Hanus tók matematiskt studentsprógv í 1956. Tey vóru bara átta studentar ta› ári›. Av teimum eru tveir ikki meira á lívi.

Mó›ir Hanusar, Súsanna í Skumpitoft, var fró›arkvinna. Her situr hon vi› f‡rsta›in á Jógvansbreyt og kar›ar fyri einum skúlaflokki, sum vitja›i Húsavík í 1973

Mynd: Edvard Joensen